## Deyvatulkur til valfund

Fríggjadagin 17. januar frá 17-19 verður valfundur í Sjónleikarhúsinum, og har verður deyvatulkur til staðar. Á einum valfundi hjá Rás 2 í Sjónleikarhúsinum herfyri gjørdi ein spyrjari vart við, at ein stórur samfelagsbólkur verður hildin uttanfyri valstríðið. Tey tunghoyrdu og deyvu hava ongan møguleika at fylgja við í, hvat fer fram á valfundum. Elin Winther Poulsen, sum var orðstýrari á fundinum, var skjót at lova, at til næsta valfund, sum Rás 2 skuldi hava í Sjónleikarhúsinum, skuldi ein deyvatulkur vera til staðar. Og nú fæst sjón fyri søgn.



## Oljugrunnurin fyrimynd

Norski oljugrunnurin hevur havt stóra ávirkan á íløguvirksemi kring heim, og tað er alment kent, at fleiri íløgugrunnar í Evropa og USA hava brúkt norska grunnin sum fyrimynd í sínum virksemi. Tað kom fram á einari ráðstevnu um íløgur í Oslo í gjár. Millum annað hava fleiri tikið við regluni hjá grunninum um at seta í mesta lagi fimm prosent í hvørt einstakt felag og at brúka langtíðaríløgur. Grunnurin eigur nú í 7.000 fyritøkum.

# Útróður má gerast meira fjølbroyttur



*- Neyðugt er at gera tað meira spennandi og fjølbroytt at vera útróðrarmaður, heldur Sonni Johansen, sum hevur verið útróðrarmaður alt sítt lív Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Eg visti ikki, at tað stóð so illa til við útróðrinum kring landið. Nógvir bátar liggja, og fleiri eru bert fáar túrar á útróðri. Ein orsøk er, at smáligt er við fiskiskapi, og ringt er at fáa fólk at støðast. Tað sigur Sonni Johansen, sum hevur verið útróðrarmaður alt sítt fríska lív**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sum stórur smádrongur hevði strandingurin Sonni Johansen eina lítla jollu, sum hann plagdi at royna eftir sild við. - Hetta dámdi ikki foreldrum mínum nakað serligt. Tey vóru bangin um meg. Tí gjørdu tey av at keypa mær eitt 8-mannafar, sum eg brúkti nógv í mínum ungu árum

### Giktin plágar

Sum blaðungur var hann við Grunningi, og longu sum umleið 15 ára gamal keyptu foreldrini honum eitt 8-mannafar úr Leirvík.

- Eg hevði eina lítla jollu, sum eg plagdi at royna eftir sild við. Hetta dámdi ikki foreldrum mínum nakað serligt. Tey vóru mangan bangin um meg. Tí gjørdu tey av at keypa mær eitt 8-mannafar.

Sonni sigur, at hann brúkti hendan bátin nógv, bæði á Skálafjørðinum, eysturi í Álinum, og um várarnar var hann onkuntíð á Norðhavinum við honum.

- Í dag eri eg ringur av gikt og kann næstan ikki fara í bát. Giktin er serliga gingin út yvir armar og bein. Eg læt glastrevjabát byggja í Íslandi fyri fáum



árum síðan, men noyddist at selja bátin aftur eftir umleið tveimum árum, tí likamið heldur ikki til hetta longur.

Hann vísir á, at ein slitin útróðrarmaður ella fiskimaður fær ongan tryggingarpening nakrastaðni.

### Bjóðar seg fram

Nú løgtingsval er í morgin, er Sonni Johansen millum teirra, sum bjóða seg fram at stýra Føroya landi komandi fýra árini.

*- Vit hava heimsins bestu veiðimenn, men vit troyta ikki allar møguleikar. Ein trupulleiki er eisini, at vit seta ikki ung fólk við, og tað er neyðugt, um útróðrarvinnuni skal verða lív lagað, heldur útróðrarmaðurin*

- Eg stilli upp fyri at hjálpa fólki, sum á ein ella annan hátt – og í breiðari merking - eru komin illa fyri.

Hann dylur ikki, at hansara áhugi ikki minst brennur fyri útróðrar-og fiskimanninum, men eisini fyri øðrum samfelagsborgarum, sum á ein ymiskan hátt hava brúk fyri, at onkur stendur við teirra við.

Støðan hjá útróðrinum nú er soleiðis vorðin, at tað almenna noyðist at grípa inn, um útróðrinum skal verða lív lagað. Neyðugt er at gera tað meira spennandi og fjølbroytt at vera útróðrarmaður.

Sonni heldur, at eitt, sum kann gerast, er at lata teir stóru útróðrarbátarnar rógva út við línu frá desember til mars og síðan beina teir í aðra vinnu.

- Nakrir bátar kundu fingið garnaloyvi eftir havtasku, aðrir kundu sloppið at trola eftir flatfiski, og uppaftur aðrir kundu fingið loyvi at farið til Íslands.

Hann heldur, at okkara fiskivinnumyndugleikar soleiðis áttu at latið menn sloppið at roynt seg.

### Eitt lítið ljós

- Vit hava heimsins bestu veiðimenn, eingin ivi um tað, men vit troyta ikki allar møguleikar. Ein trupulleiki er eisini, at vit seta ikki ung fólk við, og tað er neyðugt, um vinnuni skal verða lív lagað.

Sonni heldur, at vit eisini mugu gagnnýta okkara tilfeingið nógv betur, enn vit gera í dag, og hann tekur til, at her mugu aðrir bollar í suppuna.

- Eg veit, at eg geri mun, har eg eri. Komi eg á ting, veit eg, at eg hevði verið eitt lítið ljós, sum nógv kundu stýrt eftir og hildið seg til, bæði útróðrarmenn, fiskimenn og nógvir samfelagsborgarar í síni heild, sigur royndi útróðrarmaðurin á Strondum, sum nú bjóðar seg fram í landspolitikki.

Sonny Johansen er ikki óroyndur í kommunalpolitikki, tí á seinasta kommunuvali varð hann fyrst valdur í Sjóvar kommunu, har hann nú situr í bygdaráðnum.

# Nýggjur Bónus-handil á Borðoyarvík

**- Ynskidreymurin er, at handilin stendur liðugur til jólar, men um vit náa so langt í ár, dugi eg ikki at siga, sigur Niels Mortensen, stjóri í SMS**

HANDIL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Niels Mortensen eigur stóru bygningarnar á Borðoyarvík, har gamla spinnaríið er, og har studio hjá Rás 2 er.

Í eina tíð hevur verið alment kent, at SMS-maðurin arbeiðir við eini ætlan, sum í fyrsta lagi hevur til endamáls at hýsa einum nýggjum Bónus-handli í øðrum av hesum bygningum.

Niels Mortensen váttar fyri Sosialinum, at tekningar í løtuni verða gjørdar av einum felag í útlandinum, sum SMS samstarvar við.

- Vit hava sett ferð á hetta arbeiði, og eg vænti, at fyribils tekningar fyriliggja seinni í hesum mánaðinum.

SMS-maðurin vil einki siga um, hvussu heildarætlanin sær út, fyrr enn tekningarnar eru á borðinum, tí enn veit hann ikki, um tað, sum teir skjóta upp, letur seg gera.

Hann dylur kortini ikki, at tað í fyrsta lagi verður ein nýggjur Bónus-handil, sum lunnar verða lagdir undir á Borðoyarvík.

Spurdur, um hugsandi er, at talan kanska verður um eina avmarkaða handilsmiðstøð, sigur hann, at tað vil hann einki siga um í løtuni.

- Áðrenn vit kunnu siga nakað um ítøkiligu verkætlanina, er neyðugt, at vit fyrst fáa at vita, hvat er møguligt, sigur Niels Mortensen.

SMS-stjórin sigur, at teirra ætlan á Borðoyarvík ikki verður ávirkað av, hvat Føroya Keypssamtøka ella aðrir útbjóðaðar fara at gera í Klaksvík.

- Vit hava í fyrsta lagi okkara ætlanir við einum nýggjum og tíðarhóskandi Bónus-handli, og vit vóna, at hesin stendur liðugur og kann takast í nýtslu áðrenn langt um leingi.

Spurdur, um hugsandi er, at nýggjur Bónus-handil stendur liðugur til jólar í ár, sigur hann:

- Tað hevði sjálvandi verið ein ynskidreymur, men eg tori ikki at siga, um vit náa so langt í hesum árinum, sigur Niels Mortensen, stjóri.